## Húsarhaldstól

**BORÐOVNUR TIL SØLU**
Borðovnur við 2 plátum, til sølu fyri 400 kr. Ring
*Tel. 513346*

## Innbúgv

**NÝGGJ VELFAC ÚTHURÐ**
1 stk nýggj Velfac úthurð (útgangandi) + glaspartið til sølu. Litur: Koksgrá, stødd á úthurð 950 x 2100 mm, stødd á glaspartiði 440 x 210 mm. Meira fæst at vita við at ringja á
*Tel. 213220*

**TURKITRUMLA TIL SØLU**
Fyri kr. 2.500,-. Er 1/2 ára gomul.
*Tel. 511326*

**28 TUMMA SJÓNVARP**
Til sølu fyri kr. 1.000,-. Í góðum standi
*Tel. 511326*

**TELDUBORÐ TIL SØLU**
Úr hørðum glasið, óbrúkt. Fyri kr. 500,-
*Tel. 511326*

**TIL SØLU**
Sera bíligt telduborð, sofaborð, gestasong, nýggj madrassa 90x190
*Tel. 315075*

**REOLVEGGUR**
Til barnakamar, við skrivaraborði, hyllum, skuffum og skápi, til sølu fyri kr. 300,-
*Tel. 315056*

**TIL SØLU**
1 stk. hydraulsk pappressa fyri kr. 1.000,-. 1 kølikumma kr. 1.200,-
*Tel. 214250*

**TIL SØLU**
Eitt spísiborð + 6 stólar úr bók, kr. 1000,- Vegna flyting
*Tel. 318828*

**TIL SØLU**
2 boxmadrassur 90x200. Kr. 400,- stk. Til sølu vegna flyting
*Tel. 318828*

**SOVISOFA**
Dupult sovisofa, lítið brúkt, til sølu fyri 500 kr.Ring ella smsa á
*Tel. 284387*

**SPÍSISTOVUBORÐ**
Lúta spísistovuborð + 5 stólar til sølu fyri 500 kr.Ring ella smsa á
*Tel. 284387*

**SKÁPSHURÐAR TIL SØLU**
Tvær spegl skápsdragihurðar til sølu. 2,4x0,92 m við gólv/loft skinnara. Seljast fyri 1000 kr.
*Tel. 274146 - 456846*

**ETAGESONG**
Ein etagesong stødd 70x190 til sølu fyri 300,- kr.Ring ella smsa á
*Tel. 284387*

**REOLVEGGUR**
1 reolveggur úr furu við skuffum og skápum til sølu fyri 500,- kr.Ring ella smsa á
*Tel. 284387*

**SPÍSISTOVU BORÐ**
1 ovalt borð úr masivari furu + 6 stólar til sølu fyri 800,- kr. Ring ella smsa á
*Tel. 284387*

**VIT FLYTA AV LANDINUM OG SELJA TÍ**
Ergonomiskt borð, ið kann "hæve/sænke" við hydrauliskum systemið er vælegnað til fólk við td. ringum ryggi. 400 krKommodur x 2 eru 1½ ára gamlar, hvítar og væl hildnar. 400 pr. stk.Praktisk skógvahyll, ið rúmar 10-12 pørum av skóm. 300 kr. Áhugaði ringi
*Tel. 226006*

**2X3 LEÐUR SOFA**
vegna flyting selji eg eina lítið brúkta (uml 10mðr) svarta leður sofu. prísuruppskot 4000,-ring og hoyr nærri á
*Tel. 215679*

**TRAPPA**
Trappa bíliga til sølu. Jens Kristian
*Tel. 565590*

**HYLLASYSTEM TIL SØLU**
Hyllasystem, myrkt mahogni, hædd 190, breidd 250, 1½ ára gamalt, til sølu fyri 4500 kr. Keypt í Eikini fyri 13000 kr. Ring
*Tel. 513346*

**ANTIK BREYÐSKÁB**
Gamalt antik breyðskáb (skenkur), til sølu fyri 4900 kr. Ring
*Tel. 513346*

**TIL SØLU**
1 x gamal kassadiskur + 1 x 5 ára gamal pengakassi, í góðum standi til sølu bíliga. Ring og spyr eftir Sámal
*Tel. 361620, 361320, 361960*

**TIL SØLU**
1 rúmligur frugtdiskur, uml. 5 ára gamal til sølu, um eitt gott boð kemur. Ring
*Tel. 361620, 361320, 361960*

**TIL SØLU**
3 frystidiskar frá matvøruhandli til sølu heilt bíliga, ring og gev eitt boð og spyr eftir Sámal
*Tel. 361620 ella 361320*

**TIL SØLU**
1 Furu-køkur til sølu heilt bíliga, vegna keyp av nýggjum køki. + 1 emhetta, Rondo, Termex, stál nýprísur kr. 12000,-. Ring
*Tel. 361320 ella 361960*

**TIL SØLU**
Sovisofa til sølu, vegna flyting. Prísur kr. 1500.
*Tel. 227960*

**TIL SØLU VEGNA FLYTING**
Klaver, barnasong, 2 sofir, keypmansdiskur v.m. Ring
*Tel. 321106 ella 521106*

**EMHETTA TIL SØLU**
Gorenje emhetta til sølu. Brúkt í 1,5 ár. Ring og tosað um prís
*Tel. 268112*

**VOSS-KOMFÝRUR TIL SØLU**
VOSS-komfýrur (ELK 865-1) til sølu, brúktur í uml. 2 ár, hevur pikkulítlan skaða á lakkinum vegna flyting - annars tip top. Nýprísur tá uml. 8-9.000,-. Verður seldur fyri 3.000,- ella hægsta boð. Ring
*Tel. 268112*

**SENGUR**
2 einkultar sengur til sølu
*Tel. 312882*

**TIL SØLU**
Grátt baðikar, vesikumma, vask og tilhoyrandi lampur. Ring og tosað um prís
*Tel. 312882*

**SOVISOFA TIL SØLU**
Sovisofa við springmadress til sølu
*Tel. 312882*

**TIL SØLU**
Eitt runt køksborð við marmorplátu og hvít bein, og ein brenniovnur, ikki útpakkaður
*Tel. 452089*

**INVENTAR**
Handilsinnbúgv, hillar, reolir, kassadiskar, kassaskipan, ljós, oa. Er brúkt íkiosk áðrenn.
*Tel. 214005*

**INVENTAR**
Handilsinnbúgv, hillar, reolir, boylar, kassadiskur, kassatól, terminalur oa. Erbrúkt til skógvar/taskur.
*Tel. 214005*

**HYGG HER!**
1 sett 2x3 sofa við hvítum betrekkið til sølu vegna plásstrot. Eisini fylgir eitt træ-sofaborð við um ynskist. Ring og gev eitt boð.
*Tel. 229933*

**ANTIK DUPULTSONG**
Sera vøkur avsýrað antikk dupultsong til sølu.
*Tel. 522046*

## Leikur

**YMISKAR LEIKUR BÍLIGA TIL SØLU**
Bratz DUKKUHÚS í tveimum hæddum við trappum í millum hæddirnar str. 80x100x35 100 kr & Bratz bilur við battarí kr. 50 & 2 dukkuvognar 50 kr stk & 2 hoppibóltar 50 kr stk alt samla kr. 300
*Tel. 264456*

**TRAMBOLIN**
1 mðr. gomul stór trambolin við trygdarneti til sølu fyri kr. 2500,-. Ný prísur kr. 3200,-. Garanti fylgir við. Lítið brúkt.
*Tel. 316657*

## Lutaseðlar

**LUTASEÐLAR DRIGNIR HJÁ EB/STREYMI**
Vinnarnummur: 1 nr. 4221 2 nr. 5755 3 nr. 6479 4 nr. 0348 5 nr. 2133 6 nr. 1479 Vinningarnir fást við at ringja til
*Tel. 210582*

## Matur

**TIL SØLU**
Góð turr tjógv
*Tel. 288612*

## Pløgg

**MØTTIL TIL SØLU**
Lítið brúktur møttil, svartur v/ reyðum fóðri, støddM/L, til sølu fyri kr. 1.500,-. Ring e.kl. 18
*Tel. 211101*

**MANNFÓLKATROYGGJA**
Til føroyska búnan, mynstrut, std. M, til sølu fyri kr. 1.000,-
*Tel. 315056*

**TIL SØLU**
Lítið brúkt fyrri- og turriklæð til tann føroyska búnan
*Tel. 721586*

**TIL SØLU**
Lítið brúkt skjúrt til føroyska búnan, stødd 38/40
*Tel. 721586*




### STÓRA ROKNSKAPARVIKAN

Hesa vikuna verða øll eygu havd við roknskapum úr USA. Nú byrja roknskapirnir fyri 2. ársfjórðing nevniliga av álvara at verða kunngjørdir. Hesa vikuna koma nógv stór nøvn við roknskapum, til dømis Citigroup, Microsoft, IBM og Google. Higartíl hava 43 av teimum 500 virkjunum í vísitalinum S&P500 kunngjørt roknskap, og sum heild eru teir betri enn væntað. Um roknskapirnir hesa vikuna eisini gerast betri enn væntað, stuðlar hetta undir partabrævakursunum.

Aftrat hesum leggja fleiri íleggjarar stóran dent á, at Dow Jones vísitalið fyri 30 tey størstu partabrøvini í USA hósdagin í farnu viku hækkaði upp um tað stigið, vísitalið hevur ligið um seinastu 6 vikurnar. Samstundis kom Dow Jones upp á hægsta stigið nakrantíð. Hetta taka nógvir íleggjarar sum eitt gott tekin.

### DOLLARIN METVEIKUR

Í farnu viku viknaði amerikanski dollarin mótvegis næstum øllum øðrum gjaldoyrum. Hann kom niður á 5,39 mótvegis krónuni. Hetta er tað veikasta, hann hevur verið síðan 1995, tá hann var niðri á 5,31. Tað er áhugavert, at hann er viknaður niður um 5,44, sum hann var niðri á í 2004. Um hann verður verðandi undir 5,44 hesa vikuna, bendir tað á, at hann fer at vikna enn meir.

### LÁNSBRØV Í SUMMARFRÍ

Lánsbrævamarknaðurin sveiggjar nógv frá degi til dags, men kemur ikki rættiliga úr stað. Hetta eyðkennir ofta summarið, tá nógvir íleggjarar eru í summarfrí. Tá er lítil handil, og hetta fær kursirnar at sveiggja nógv, men ger samstundis, at eingin torir rættiliga at satsa pening uppá, um marknaðurin fer av álvara upp ella niður.

### HESA VIKUNA

Hetta verður ein hendingarík vika á marknaðunum. Størstur verður áhugin fyri roknskapunum, og tað koma eisini fleiri hagtøl, ið kunnu flyta marknaðirnar, sum til dømis prísvøkstur og tøl fyri amerikanska bústaðarmarknaðin.

**Vísital fyri norrøn partabrøv**




**Donsk 10-ára renta**




| Marknaðir | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Norðurlond | 1523,72 | + 1,68% |
| Alheims partabrøv | 8932,86 | -0,01% |
| Atlantic Petroleum | 1089,00 | -0,18% |
| Føroya Banki | 231,00 | + 0,43% |
| Eik | 712,00 | -2,47% |
| KB Trygg Eurostoxx | 111,84 | + 0,74% |
| USD | 540,29 | -1,04% |
| JPY | 4,43 | + 0,19% |

Broytingarnar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan. Myndirnar vísa gongdina seinastu 3 mánaðarnar.
Greiningin er grundað á keldur, sum Kaupthing metir vera álítandi, men Kaupthing hevur ikki ábyrgd av, at tilfarið altíð er neyvt og nágreiniligt. Kaupthing kann heldur ikki ábyrgdast tapi ella líknandi, sum stendst av gerðum, ið hava støði í greiningunum í hesum tilfari.

Postsmoga 3090, Bókbindaragøta 8, 110 Tórshavn, Tel 351500, Faks 351501, kf@kaupthing.fo, www.kaupthing.fo

KAUPTHING BANK